## Metstór undirtøka fyri ES-limaskapi

Ein meiningakanning, sum ein kanningarstovnur hevur gjørt fyri trý norsk bløð, vísir, at 49,6 prosent av norsku veljarunum taka undir við, at Noreg fer upp í ES. Tað eru 0,5 prosent fleiri enn í seinastu kanning, og so stór hevur undirtøkan fyri limaskapi ikki verið í nakrari aðrari kanning hjá stovninum, sigur norska útvarpið.

Men kanningin vísir eisini, at tey, sum siga nei til ES-limaskap, eru fleiri nú, enn tá spurningurin varð reistur seinast. Nú siga 36,4 prosent nei. Í seinastu kanning var hesin parturin 33,9 prosent. 14 prosent hava ikki tikið støðu.

Í undanfarnum kanningum hava tey flestu av teimum yngru verið ímóti norskum limaskapi í ES, men hetta er broytt nú. Eftir teirri nýggju kanningini taka 46 prosent av teimum, sum eru yngri enn 30 ár, undir við limaskapi í ES, meðan 39 prosent eru ímóti.

## Fekk 11 ára fongsul

Í Haag hevur altjóða krígsbrotsmannadómstólurin dømt fyrrverandi bosniaserbiska forsetan, Biljanu Plavsic, ellivu ára fongsul.

Biljana Plavsic varð dømd fyri at hava framt brotsverk ímóti mannaættini í árunum frá 1992 til 1995, tá hon var leiðari hjá serbunum í Bosnia. Upprunaliga noktaði hon seg seka, men í fjør broytti hon støðu og játtaði seg seka í etniskari útreinskan av kroatum og muslimum í Bosnia. Hon er tann fyrsti serbiski leiðarin í gamla Jugoslavia, sum hevur viðgingið seg sekan í hesum brotsverkinum.

Ákæruvaldið í Haag kravdi, at Biljana Plavsic skuldi fáa millum 15 og 25 ára fongsul. meðab verjarnir hildu, at átta ár var nóg mikið. Tað er ikki greitt, hvar tann 72 ára gamla Biljana Plavsic skal sita dómin. Í løtuni situr hon í varðhaldi í Beograd.

## Aftur ivi um Concorde

Eitt Concorde-flogfar hjá franska flogfelagnum Air France misti ein part av velróðrinum, meðan tað var á veg úr París til New York fyrradagin. Tað eydnaðist kortini flogfarinum at seta seg í øllum góðum.

Fyri bert einari viku síðani noyddist eitt annað Concorde-flogfar hjá Air France at neyðlenda í Kanada, tí trupulleikar vóru við motorunum, og hesir báðir tilburðirnir hava aftur sátt iva um, hvussu trygg hesi flogførini eru. Tað eru bara Air France og bretska British Airways, sum hava Concorde-flogfør, og bretska flogfelagið hevur sagt, at tað umhugsar at taka síni fimm Concorde-flogfør úr rutu. Air France hevur sjey slík flogfør.

Í juli í 2000 doyðu 113 fólk, tá eitt Concorde-flogfar hjá Air France datt niður, júst sum tað var farið á flog í Charles de Gaulle-floghavnini uttan fyri París.

## Skal sita alt lívið

Ein kinesiskur dómstólur hevur sýtt fyri at viðgera eina áheitan um at broyta dómin hjá tí politiska andstøðinginum Wang Biangzhang, sum er dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri yvirgang.

Seinastu árini hava teir kinesisku myndugleikarnir noytt fleiri politiskar andstøðingar í útlegd. Wang, sum er útbúgvin lækni, er tann fyrsti politiski andstøðingurin í Kina, sum er dømdur fyri yvirgang. Hann er eisini ákærdur fyri at hava njósnast fyri Taiwan.

Wang Biangzhang flutti til USA í 1982, men hansara viðhaldsmenn siga, at hann varð rændur undir einari vitjan í Vietnam í fjør. Tað vísti seg, at tað vóru kinesiskir agentar, sum høvdu rænt hann, og at teir seinni høvdu flutt hann til Kina, so hann kundi koma fyri rættin har.

# Russland fer kanska at nýta sýtingarrættin



**Tað er ikki óhugsandi, at Russland fer at nýta sýtingarrættin ímóti tí seinasta uppskotinum um Irak, sigur russiski uttanríkisráðharrin. Samstundis bendir alt á, at Hans Blix hvessir pennin.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Igur Ivanov segði ikki beinleiðis, at Russland fer at nýta sýtingarrættin í ST-trygdarráðnum ímóti Irak-uppskotinum hjá USA, Bretlandi og Spania.

Okkara áskoðan er, at alt trygdarráðið og serliga tey fimm føstu limalondini eiga at standa saman. Sum øll vita, hava tey fimm sýtingarrætt, men hann skal nýtast við skili og eigur bert at verða nýttur, tá heimsfriðurin er í vanda, segði Igor Ivanov á tíðindafundi í Beijing.

Russiski uttanríkisráðharrin vildi ikki siga, um Russland er til reiðar at nýta sýtingarrættin fyri at forða einum álopi á Irak, men eygleiðarar í Beijing siga, at orðini hjá Ivanov geva eina ábending um, at Russland kanska fer at nýta rættin, tá trygdarráðið fer at taka støðu til uppskotið hjá USA, Bretlandi og Spania.

Fyrradagin varð annars kunngjørt, at Vladimir Putin og George W. Bush vóru samdir um, hvussu Irak-kreppan skal loysast, og at semjan var komin í lag eftir eina telefonsamrøðu teirra millum. Tað váttaði talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Ari Fleischer, eisini, men hann vildi ikki siga, um tað eisini bar í sær, at Russland fór ikki at nýta sýtingarrættin í trygdarráðnum.

### Hvassari orðalag

Leiðarin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum, Hans Blix, skal aftur í dag kunna limalondini í trygdarráðnum um gongdina í Irak, men longu í gjár visti bretska útvarpið at siga, at orðalagið í hesari frágreiðingini verður hvassari enn í teirri seinastu.

Sambært BBC fer Hans Blix millum annað at siga, at samstarvshugurin hjá iraksku myndugleikunum er framvegis ikki nøktandi. Og sum skilst er Blix heldur ikki nøgdur við, at Irak sigur seg vera sinnað at oyðileggja tær umstríddu rakettirnar. Hann vil síggja tað í verki.

# Biskuppur ímóti kríggi

Fyrradagin varð Rowan Williams vígdur sum tann 104. biskuppurin av Canterbury. Nýggi biskuppurin, sum er ættaður úr Wales, ber orð fyri at hava sínar egnu hugsanir, og hann hevur heldur ikki dult tær. Eitt nú hevur hann funnist at Irak-politikkinum hjá Blair-stjórnini.

# Fiskivinnan fer at víkja fyri oljuvinnuni

**Um fá ár fer oljuvinnan at hava størri týdning í norsku Finnmørkini enn fiskivinnan, sigur norskur samfelagsgranskari.**

NOREG
*Árni Joensen:*

Um fá ár fara olja og gass at hava størri týdning í Finnmørkini enn tann vanliga fiskivinnan. Tað heldur í hvussu er samfelagsgranskarin Arne Rydningen.

Hann sigur, at nútímans tøkni ger, at arbeiðsplássini í fiskivinnuni gerast støðugt færri í Finnmørkini, og sjálvt um nýggjar framleiðslur skuldu givið fiskivinnuni eitt skump uppeftir, fer olju- og gassvirksemið í Barentshavinum at fáa størri og størri týdning.

Arne Rydningen, sum starvast hjá stovninum Norsk Samfunnsforskning, sigur við norska útvarpið, at myndugleikarnir eiga at leggja størri dent á kunnleika, tøkni og nýskapan í Finnmørkini, so samfelagið har kann fáa summest burtur úr oljuvinnuni í Barentshavinum.

Hann heldur, at almennir pengar til hetta endamálið høvdu givið nógv av sær. Men hann leggur afturat, at verður hetta gjørt, eiga myndugleikarnir ikki bert at hugsa um fiskivinnuna.







# HUGO CHAVÉZ – tann elskaði og umstríddi gyklarin

**Hann er ein sjónleikari av Guðs náði og ein politisk slanga, sum náðileyst kvalir sínar fíggindar, og sum samanber seg sjálvan við frælsishetjuna Simon Bolivar**

VENESUELA
*Árni Joensen*

Vit eru stødd í venesu-elanska høvuðsstaðnum Caracas ein sunnumorgun. Forsetaborgin Miraflores, sum er har eysturi í býnum, skyggir í morgunsólini. Kring alla borgina standa teir servandu hermenninir, sum hava svorið at fara í deyðan fyri landsins forseta, Hugo Chavéz.

Brádliga stendur hann har. Í reyðari skjúrtu, sum bert er knept nakað upp, rennibrókum og renniskóm. Hann er í sera góðum hýri, ja, eitt stórt bros, allur sum hann er. Og á sín vanliga hátt byrjar hann:

- Venesuela hevur fingið fleiri óheftar útvarps- og sjónvarpsstøðir, sum ikki gera annað enn at spilla landsins forseta út. Halda tær ikki upp at við hesum, taka vit sendiloyvið frá teimum. Tey óheftu tíðindafólkini halda, at tey kunnu gera, sum teimum lystir. Tey spæla James Bond, so nú er tað 007 ímóti Hugo Chavéz. Tann dystin fari eg at vinna, sigur hann og flennur.

Hugo Chavéz er heryvirmaður av útbúgving. Hann var liðugur við útbúgvingina í 1975. Hann kom sær skjótt fram, og í 1992 stóð hann á odda fyri einari miseydnaðari kvettroynd. Hann varð settur í fongsul, men fekk grið tvey ár seinni, og so byrjaði hansara politiska lív.

### Vinstrasinnaður populistur

Hugo Chavéz hevur tríggjar grundarsteinar: Bíbliuna, ta suðuramerikansku frælsishetjuna Simon Bolivar og Karl Marx, og hendan samanrenningin hevur gjørt hann til tað, sum vit kunnu kalla ein vinstrasinnaðan populist.

- Eins og Bolivar vilja vit skipa eitt sameint Latínamerika, eitt slag av einum ES. Tað skal verða okkara mótvekt ímóti teirri nýggju frælslyntu hugsjónini, Heimsbankanum og Altjóða Gjaldoyragrunninum. Vit skulu endurreisa æruna hjá latínamerikanska heimspartinum, sigur Chavéz.

Hann tosar, veipar við ørmunum og herðir røddina. Tey fátæku í Venesuela, og tey eru mong, elska hendan mannin. Sambært ST eru 80 prosent av teimum 24 milliónunum, sum búgva í Venesuela, blóðfátæk, og uttan hjálp frá tí almenna klára tey ikki gerandisdagin.

Tí elska tey Chavéz. Tí flenna tey at honum, tá hann roynir seg um gyklara, flenna saman við honum, tá hann leggur andstøðuna undir líkt og ólíkt, og atkvøða fyri honum, tá hann biður um stuðul. Síðani hann varð valdur til forseta í 1998 við 56 prosentum av atkvøðunum, hevur hann vunnið átta fólkaatkvøður. Andstøðan ivast ikki í, at hann ætlar sær at gerast einaræðisharri.

- Andstøðan, sigur Chavéz við einum háðandi tónalagi. - Tey ríku hóreiggja sær sum fascistar og kvettmenn, sum arbeiða ímóti lýðveldinum. Í tveir mánaðir vóru tey í verkfalli, í 60 dagar løgdu tey landsins týdningarmestu inntøkukeldu, oljuvinnuna, lamna. Men hví? Jú, tí vit hava gjørt av at endurskipa tað almenna oljufelagið PDVSA, sum var vorðið ein statur í statinum, sum varð stýrt av yvirstættini, sum rændi inntøkurnar frá tí almenna og legði inn undir seg. Men nú skulu oljuinntøkurnar koma fólkinum til góðar.

Í Vensuela er tað, sum at ein ósjónligur veggur býtir fólkið í tvey. Annaðhvørt tekur tú undir við Chavéz og hansara bolivarisku dreymum, ella ert tú ímóti honum. Mong hava valt at rýma av landinum.

### Vinmaður Fidel

Eingin vesturlendskur ríkisleiðari hevur so gott samband við kubanska leiðaran, Fidel Castro, sum Hugo Chavéz. Teir eru vinmenn, góðir vinmenn, og hittast eisini javnan sum slíkir.

Herfyri vóru foreldrini hjá Chavéz á Kuba, har tey vóru persónligir gestir hjá Fidel, so tað er ikki so løgið, at teir báðir hava gjørt sáttmálar landanna millum. Fidel fær dagliga 50.000 tunnur av olju, sum verða seldar honum við stórum almennum stuðuli, og aftur fyri fær Hugo kubanskar læknar, ítróttarleiðarar og mentafólk í samsýning.

- Nú senda vit eisini gomul og sjúk til Kuba, har teir hava góð sjúkrahús. Eg havi stóra virðing fyri Fidel, sigur Chavéz. Hann veit fullvæl, at hetta hóvar ikki USA, sum eisini hevur ta venesuelansku oljuna fyri neyðini.

At nevna Hugo Chavéz fyri Bush og hansara monnum, er sum at vísa tarvi reytt. Tí Chavéz stuðlar Castro, hann hevur verið í Libya og vitjað Muammar Gadafi, og so hevur hann eisini hitt sjálvan Saddam Hussein. Og so hevur hann aftrað seg við at fordøma ta kolombisku uppreistrarrørsluna FARC, sum sambært Washington er ein yvirgangsfelagsskapur.

Tann 48 ára gamli Chavéz, sum er giftur tvær ferðir og eigur fimm børn, er hvønn sunnudag í almenna sjónvarpinum. Higartil eru sendingarnar vorðnar fleiri enn 140 í tali. Alt verður sent beinleiðis, og Chavéz letur ikki eina løtu fara til spillis, men tosar uttan íhald. Hann greiðir frá, hvat stjórnin hevur gjørt ta seinastu vikuna, syngur ein sang og svarar spurningum frá fólki, sum ringja. Av og á lesur hann úr onkrari bók, serliga tí nýggja lógarsavninum.

Við sær í sjónvarpið hevur hann altíð einar tveir av sínum ráðharrum, sum nágreiniliga skulu greiða frá, hvat teir havga gjørt í fólksins tænastu ta seinastu vikuna. At enda kemur stjórin í almenna oljufelagnum á skíggjan at siga fólki, hvussu seinasta vikan hevur hilnast, og hvussu stórt avlopið hevur verið.

- Hetta hevur róp uppiborið, sigur Chavéz og klappar.

Seks tímar varir sendingin. Tjóðsangurin verður sungin, og pallljósini verða sløkt.

*(Kelda: Aftenposten)*